TB – B68 1-4 (1-1)

# B68 hevði tamarhald á Sevmýri



*Øssur Hansen fekk tvey mál á Sevmýri móti TB. Hóast TB kom á odda, vendi B68 dystinum til 4-1*

**Hóast TB kom á odda, so var ongantíð ivi um, at toftamenn høvdu tamarhald á, og so fingu teir málini, sum bóru sannførandi sigurin við sær**

TB-B68
*Jóannes Hansen*

TB vann á heimavølli í fyrsta umfarinum. B68 meiri enn hálvkiksaði á heimavølli í fyrsta umfarinum, tá teir vóru hepnir at fáa 1-1 móti GÍ. Annað umfarið skuldi á Sevmýri vísa, hvussu styrkismunurin millum hesi bæði liðini er. Og tað var eingin ivi. B68 vann 4-1, og teir vóru leikliga omaná, so at siga alla tíðina. TB spruttaði eina løtu í 2. hálvleiki, og Dan Mortensen arbeiddi nógv á toppinum, men Hans Fróði Hansen og liðfelagarnir í B68 verjuni høvdu tak á tí.

Næstsíðsta sunnudag var B68 í 3-4-3 uppstilling. Hesa ferð hevði Frank Skytte broytt til 4-3-3. Hetta saman við sera góðum hugburði í fagurt leiktum dysti vóru við til at leggja botn undir skilagóðum avriki.

### Heppið leiðslumál

TB hevði ikki nógvar møguleikar, men teir komu kortini á odda, tá eitt korter var farið. Dan Mortensen royndi móti málinum, men royndin tóktist lítið vandamikil, tá bólturin umvegis ein verjuspælara var á veg inn til málverjan. Tað gjørdist kortini vandamikið, og tí støðuni var málverjin upphavið til. Hann helt seg ikki hava rætt at taka bóltin við hondunum. Í staðin royndi hann at temja við lærinum, og tá hann sparkaði út aftur, kiksaði royndin. Bólturin fór út aftur til Dan Mortensen, sum takkaði fyri tilboðið og sendi í málið.

1-0 til heimaliðið, og so vóru møguleikar kanska fyri, at teir skuldu taka yvir, og at B68 fór at fara niður við nakkanum. Men soleiðis gekk tað ikki. Vladimir var tryggur aftasti skansi hjá TB, sum var í 3-5-2 uppstilling, og Nebosja royndi á verjukenda miðvallarplássinum at syrgja fyri, at Fróði Benjaminsen ikki var so nógv við í spælinum. Men B68 hevði størri breidd, teir spældu seg til møguleikar, og tað var bara ein spurningur um tíð, nær tað fór at eydnast teimum at javna.

Anders Nygaard var óheppin, tá hann við høvdinum sendi í tvørtræið, og fleiri skotroyndir úti frá fóru dygst framvið stólpanum hjá Lars Müller, sum í TB málinum hevði fleiri góðar bjargingar.

Eina løtu undan steðginum eydnaðist tað B68 at javna. John Heri Dam, sum kom ofta ígjøgnum í vinstru, royndi seg við skoti, men verjan blokeraði. Bólturin stakk til Anders Nygaard, sum sendi framvið málverjanum.

### Breiddin var góð

Í 2. hálvleiki hevði B68 takið mest sum allatíðina. Eina løtu hevði TB hug at trýsta, men tað var skjótt, at tað sást, at gestirnir høvdu størri breidd. Bæði tá tað ráddi um spælararnar, og tá tað ráddi um at brúka breiddina á vøllinum. Arnold Joensen og Øssur Hansen togaðu spælið langt út, og so yvirlappaðu og Marlon Jorge og John Heri Dam í borðunum.

John Heri Dam átti eisini innleggið til leiðslumálið. Hann sendi innfyri, Anders Nygaard var ágrýtin og um reppið at skora, men tað slapp hann frá, tí ein tvøráfótur syrgdi fyri, at bólturin fór framvið málverjanum.

B68 leiðslan var leingi tepur. Tað hevði kanska eitt sindur av ampa við sær á gestandi liðnum. Í fyrra hálvleiki høvdu teir verið vitni til, at heimaliðið fekk eitt heppið mál, og møguleikin fyri endurtøku kundi ikki útilokast. Men tað boðaði frá størri B68 leiðslu, tá Fróði Benjaminsen sendi beinleiðis fríspark á tvørtræið.

Tá tað leið móti endanum, fekk B68 tey bæði málini, sum staðfestu stórsigurin. Arnold Joensen átti innleggið, sum Østssur Hansen við høvdinum umsetti til 3-1, og Arnold Joensen átti eisininnleggið, tá Øssur Hansen skoraði til 4-1.

### Dysturin í tølum

TB – B68 1-4 (1-1)
1-0: Dan Mortensen
1-1: Anders Nygaard
1-2: Sjálvmál
1-3: Øssur Hansen
1-4: Øssur Hansen

TB: Lars Müller – Tórur Mortensen, Vladimir Matijivic, Andras Mortensen – Bárður Dimon, Einar Petersen, Nebosja Urtajl, Zoran Mancic, Rasmus Nolsøe – Dan Mortensen, Aleksandar Radosavljevic.
B68: Michal – Marlon Jorge, Hans Fróði Hansen, Messias Perreira, John Heri Dam – Jann Ingi Petersen, Oleif Joensen, Fróði Benjaminsen – Arnold Joensen Anders Nygaard, Øssur Hansen

# Eysturoyggin stríðist um ólavsøkuna

**Bæði NSÍ og B68 eru eftir sigrar hósdagin væl fyri undan fyrru hálvfinaluni í kappingini um løgmanssteypið**

LØGMANSSTEYPIÐ
*Jóannes Hansen*

Telvingin, um hvør skal vera løgmaður, er ikki liðug enn. Tí er ikki greitt, hvør skal ganga fremstur í skrúðgonguni ólavsøkudag, og hvør skal rætta steypið til vinnaran í steypafinaluni, sum aftur í ár verður spæld ólavsøkudag.

Verkfallið hevur órógvað, men í morgin verður fyrra umfarið í stríðnum um, hvør skal vera annar parturin í finaluni. Tað stríðið stendur millum NSÍ, sum eigur heimavøll í morgin, og B68, sum verður á heimavølli, tá seinni dysturin verður spældur.

Grannauppgerðirnar eru altíð spennandi og tættar, og dysturin í morgin, tá Jógvan Martin Olsen fyri fyrstu ferð skal standa andlit til andlit við barndómsfelagið hjá sær, verður einki undantak. Kanska fer tað kortini at síggjast, at talan er um fyrra hálvleik í stríði, sum fevnir um tvær ferðir 90 minuttir.

Sambært skránni skuldi fyrra hálvfinalan verið spæld 28. apríl og tann seinna í morgin. Hetta forpurraði verkfallið, og vit hava ikki frætt, nær seinni dysturin verður.

Bæði NSÍ og B68 eru eins væl fyri, sum tey vóru hósdagin. Eingin spælari noyddist av vøllinum, tí hann var skaddur, og eingin spælari sá reytt. Gul kort í landskappingini telja ikki við í steypakappingini.

NSÍ vann hósdagin á heimavølli 3–2 ímóti GÍ, og B68 vann á útivølli 4–1 ímóti TB. Tí kunnu vit við øðrum orðum siga, at bæði liðini fara á vøllin við sjálvsáliti.

HB skal spæla um hitt finaluplássið ímóti vinnaranum av uppgerðini millum VB og EB/Streym.

Hvør skal handa løgmanssteypið á ólavsøku verður gjørt av í politisku telvingini á gamla apotekinum. Um tað verður greitt, áðrenn tað verður greitt, hvørjum vinnarin av hálvfinaluni NSÍ–B68 skal spæla ímóti kunnu vit bara gita um.



# Hugburðsbroyting krevst

**Ítróttarstjórin í FCK helt eftir dystin, at var hugburðurin hjá einstøku leikarunum, sum avgjørdi steypafinaluna**

DONG CUP
*Jákup Mørk - Parkin*



*Niels Christian Holmstrøm hevði vónað, at leikararnir fóru at stríðast nakað meira, men hann mátti bara ásanna, at OB var betri á degnum*

Ítróttarstjórin í FCK, Niels Christian Holmstrøm, kundi sjálvandi hugsað sær eitt øðrvísi úrslit í donsku steypafinaluni. Men eins og flestu av hinum áskoðarunum í Parkini, so mátti eisini hann ásanna, at OB snøgt sagt var betra liðið.

– Tað er nokk eingin sum helst ivi um, at tað var rætta liðið, sum vann dystin, helt hann fyri, tá vit í meldrinum millum leikarar, venjarar og tíðindafólk fingu orðið á hann.

Tá tosið fall á, hvat gjørdi munin í dystinum, var hann skjótur at svara, at tað so avgjørt var hugburðurin hjá leikarunum.

– Tá liðið hjá tær skal spæla ein somikið týdningarmiklan dyst, so hevur tó sjálvandi eina vón um, at leikararnir bróta upp ermar, og fara inn á vøllin at geva alt, sum teir hava. Tað var tó bara annað liðið, sum gjørdi tað í dag. Okkara leikarar sóu heldur út, sum um teir royndu at gera onkrar venjingar á vøllinum. Onkrar venjingar, sum teir dugdu illa.

### Órógvaði ikki

Fleiri av heimligu lesarunum hava ivaleyst lagt til merkis, at seinastu tríggjarfýra dagarnir hava donsku dagbløðini skriva rættuliga nógv um FCK. Hetta tí ein bók um felagið kemur á marknaðin sunnudagin. Sama dag sum FCK skal spæla avgerandi dystin móti Brøndby.

Sjálvur helt ítróttastjórin tó ikki, at hetta var nakað, sum hevði órógvað fyrireikingarnar til steypafinaluna.

– Eg havi sjálvandi frætt okkurt um, at bløðini hava skrivað, men eg havi so ikki sjálvur lisið tað. Snøgt sagt tí eg havi havt alt ov nógv at hugsa um sjálvur.

– Men eg kann gott staðfesta alt fyri eitt, at tað so ikki hevur ávirkað okkum. Eg kann ikki ímynda mær, at nakað, sum vit ikki kenna til, stendur í bókini, so har er helst einki at óttast fyri okkara viðkomandi, sigur Holmstrøm, áðrenn hann at kortini letur eitt skot av móti donsku miðlunum, sum komu við tíðindunum.

– Tað er ikki tað. Eg haldi tað vera í fínasta lagi, at FCK kann brúkast til at selja avísir uppá. Ikki minst, tá ein hending her í felagnum frá 1995 er somikið áhugaverd, at blaðið, sum sigur seg vera fyrst við tí seinasta, kann seta hana á spísiseðlarnar í handlunum.

### Nýggjur dystur

Sum nevnt, so var Holmstrøm heldur keddur um, at leikarar hansara ikki høvdu sýnt rætta hugburðin fyrstu løtuna av dystinum. Sunnudagin er aftur talan um stórdyst, men ítróttastjórin óttaðist á ongan hátt, at søgan fer at verða hin sama til ta tíð.

– Tað geri eg so als ikki. Eingin veit hví tað gekst so illa í hond í dag, men eg ivist ikki í, at leikararnir fara við fullari ferð inn á vøllin móti Brøndby. Teir vóru kanska vónbrotnir í dag, men eitt sindur av hvíld og løtt venjing verður á skránni í morgin, og so verða tankarnir hjá øllum vendir móti sunnudegnum, segði Niels Christian Holmstrøm at enda.

# Frustrerandi á beinkinum

**Hóast vónbrotin um tapið og plássið á beinkinum, so eru Todi og liðfelagarnir longu nú farnir undir fyrireikingarnar til stórdystin móti Brøndby**

DONG CUP
*Jákup Mørk*



*Eg skal ikki siga, at tað hevði ringt at sett seg upp, um vit skuldu hitt Viborg á útivølli, men tá talan er um dyst móti Brøndby, so er tað eingin trupulleiki, sigur Todi um tað, at spæla tveir somikið týdningarmiklar dystir*

Sjálvsagt var tað ein vónbrotin Todi Jónsson, sum føroysku tíðindafólkini hittu eftir dystin í Parkini. Vónbrotin um úrslitið, og kanska eisini um tað, at hann ikki slapp at byrja millum teir fyrstu ellivu á vøllinum.

Spurdur um hetta segði hann, at hann fekk boðini frá venjaranum dagin fyri dystin, men í aðrar mátar vildi Todi ikki gera nakrar viðmerkingar um, hví hann varð settur á beinkin. Heldur ikki var nakað at frætta, tá vit spurdu, um hetta var gjørt fyri at spara hann, soleiðis at hann ístaðin kundi byrja inni sunnudagin.

### Frustrerandi

Um sjálvan dystin mátti Todi sjálvandi viðganga, at tað var ógvuliga frustrerandi at sita á beinkinum. Ikki minst tá tað gekst somikið illa í hond hjá liðfeløgunum.

– Nú veit eg ikki, um tað hevði broytt nakað, um eg var við, tí í fyrra hálvleiki var snøgt sagt einki skil á hjá okkum. Teir fáa eitt heppið mál til 1-0, og tá teir so beint eftir hetta skora til 2-0 við einum annars flottum máli, so steðgaði alt upp hjá okkum.

Fyri stuttum hevði FCK annars vundið burtur úr OB. 4-0 endaði dysturin millum liðini í landskappingini, men Todi helt tó ikki, at hetta hevði nakað at týða.

– Tað er í øllum førum ikki soleiðis, at vit undirmettu teir ella nakað. Teir vóru bara betri enn vit í dag.

### Klárir sunnudagin

Eitt er vónbrotið, sum hósdagurin kastaði av sær. Annað er, at longu sunnudagin skulu FCK-leikararnir aftur í eldin, tá stórdysturin móti Brøndby er á skránni. Ein dystur, sum uttan iva fer at gera av, hvat lið kann rópa seg danskan meistara, tá kappingarárið er liðugt.

At hava tveir somikið týdningarmiklar dystir innan fýra dagar, kann sjálvandi órógva, men í FCK halda teir tó ikki, at hetta er so.

– Eg skal ikki siga, at onkur innast inni hevur hugsað eitt sindur um báðar dystirnar. Men vit eru yrkisleikarar, sum skulu duga at taka ein dyst í senn, og so mugu vit bara gloyma alt annað.

– Men tað skerst ikki burtur, at talan er um stórdyst sunnudagin. Í dag taptu vit so steypafinaluna, men meistaraheitið er hóast alt størri, so tann dystin skulu vit vinna.

Men við tveimum somikið týdningarmiklum á rað. Er tað tá ikki vandi fyri, at tit ikki fáa løtt battaríini til sunnudagin?

– Ikki í hesum førinum. Eg skal ikki siga, at tað hevði ringt at sett seg upp, um vit skuldu hitt Viborg á útivølli, men tá talan er um dyst móti Brøndby, so er tað eingin trupulleiki. Tá verða vit allur 100% klárir, segði Todi at enda, áðrenn hann saman við liðfeløgunum fór inn til døgurðan, sum DBU skipaði fyri. Ein døgurði, har tað uttan iva var stórur munur á, hvussu huglaðið í teimum báðum fótbóltslegunum var.